## Kirkjurenning á jólum

Aftur í ár verður skipað fyri kirkjurenning jólaaftan, og hesa ferð verður okkurt fyri børn eisini á skránni. Tað er Hvirlan, ið skipar fyri, og verður byrjað á Tórsbreyt klokkan 10 jólaaftansmorgun. Børnini renna niðan í Hoyvíkar kirkju eftir gøtunum og komin oman aftur á frælsavøllirnar verður okkurt spæl og frælsakent á skránni. Hjá teimum vaksnu verður runnið eins og vanligt oman fram við katolikkakirkjunum, fram við Landssjúkrahúsinum, vestur til Kirkjubøar og heim aftur, har Vesturkirkjan, Havnar kirkja, Adventistakirkjan og Hoyvíkar kirkja eru á leiðini. Fyrireikararnir boða frá, at fólk eru í Kirkjubø at traktera tey treystastu, meðan hini, ið renna styttri leiðir fáa okkurt undir tonna á frælsavøllunum.



## Tímir ikki Larsen

Mads Larsen vann um vikuskiftið á italska Roberto Cocco á stóru boksistevnuni í Zürich, og alt fyri eitt er danska kravið nú ein HM-dystur millum Larsen og Mikkel Kessler. Sjálvur er Kessler tó ikki serliga hugtikin av hesum tosinum. – Hvat skal eg við Mads Larsen. Hann er hvørki heimsmeistari ella nakað stórt boksinavn, so eg veit ikki reiðiliga, hví eg skal tíma at boksast móti honum, sigur Mikkel Kessler við danska Ekstra-Bladet.

# Var eingin trupulleiki í august

**Rógvi Jacobsen harmast, at KÍ ikki hevur fíggjarliga orku at røkja sáttmálan, sum partarnir skrivaðu undir í heyst. Men hann fegnast um greiðu útmeldingina, sum hann hevur fingið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fagnaðurin var stórur í Klaksvík, tá tað í summar stóð greitt, at Rógvi Jacobsen kom til felagið. Longu tríggjar mánaðir seinni stendur greitt, at partarnir skiljast aftur. KÍ hevur ikki ráð til landsliðsáleyparan*

Frøin var stór á klaksvíkingum, tá tað í summar gjørdist greitt, at landsliðsframherjin Rógvi Jacobsen kom heim at hjálpa barndómsfelagnum. Hann og KÍ skrivaðu sáttmála, sum í fyrstu atløgu knýtti hann at felagnum til kappingarenda í 2010.

Men heimasíðan hjá KÍ skrivaði leygardagin, at Rógvi Jacobsen og leiðslan eru komin ásamt um, at sáttmálin steðgar 31. desember 2008.

- Døpru fíggjarligu útlitini í Føroyum og ikki minst í Norðoyggjum merkjast eisini í Klaksvíkar Ítróttarfelag. Leiðslan arbeiðir í løtuni við at tryggja felagnum haldgóðan rakstur framyvir, skrivar heimasíðan.

- Tað er sjálvandi keðiligt, at eg nú standi uttan sáttmála, men hinvegin eri eg fegin um, at felagið longu nú meldar somikið greitt út, sigur Rógvi Jacobsen, sum altso er sáttmálaleysur í løtuni.

- Hinvegin kanst tú siga, at tað er illa sæð av felagnum, tá teir bara tríggjar mánaðir eftir undirskrift av sáttmála boða mær frá, at teir ikki hava ráð at røkja henda.

### Fært tú for nógv í løn?

- Tað geri eg helst eftir teirra mátistokki. Men lønin hjá mær var so ikki nakar trupulleiki, tá sáttmálin varð gjørdur. Men kreppan rakar hart í Klaksvík í løtuni, og tá er tað væl soleiðis, at stuðul til eitt nú ítróttafeløg er eitt av fyrstu punktunum, sum verður skorið burtur, sigur Rógvi Jacobsen.

Hann sigur, at hann enn ikki hevur gjørt av, hvussu fótbóltsframtíðin hjá sær sær út í 2009.

- Onkur følari hevur sjálvandi verið, men enn fái eg so einki sagt. Heldur ikki um talan verður um føroyskt ella útlendskt felag. Tað er ein spurningur, sum eg ætli mær at fáa greiðu á í januar mánaði. Nú ætli eg at halda jól sum sáttmálaleysur fyri fyrstu ferð síðani 1999, og tað hevur so eisini sínar fyrimunir. Eitt nú nýtist mær ikki at hugsa um, hvussu nógv eg eti av jóladunnuni, sigur Rógvi Jacobsen.

# Tvey feløg vóru undir eftirliti í 2008

**Aðalskrivarin hjá FSF váttar, at fíggjarstøðan í tveimum av Formula-feløgunum var somikið vánalig í ár, at tey vóru undir beinleiðis eftirliti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan kappingarbyrjan skal FSF hava bæði roknskap og fíggjarætlan frá feløgunum, sum taka lut í Formula-kappingini.

- Tað eru trý høvuðsendamál í hesum, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

- Fyrst og fremst, so skulu vit við hesum tryggja, at eitt felag, sum byrjar eitt kappingarár, eisini er ført fyri at fullføra hetta undir forsvarligum umstøðum. Harnæst er hetta eisini ein liður í at tryggja kapping á javnbjóðis føti. Hetta skilt á tann hátt, at eitt felag ikki fær fyrimunir fram um onnur, bara við at lata vera við at rinda sínar rokningar. Og í triðja lagi er endamálið at verja fótbóltin, soleiðis at ítróttin ikki kemur í ringt orð orsakað av, at kreditorar verða noyddir at avskriva stórar upphæddir.

Og Ísak Mikladal váttar eisini, at fíggjarstøðan í tveimum av feløgunum í ár var somikið vánalig, at hesi vóru undir beinleiðis eftirliti av Fótbóltssambandinum.

- Tað er rætt. Tá so er, so krevja vit meira leypandi rapporteringar, har vit kunnu síggja, hvør gongdin er. Og tað var altso neyðugt í tveimum førum í ár, sigur aðalskrivarin.

Ísak Mikladal vil tó ikki siga, hvørji tey bæði feløgini vóru.

